## DAGSINS MEINING

# Jóannes Eidesgaard samráðingarleiðari

Sambart tíðindunum íí ÚF hevur løgtingsformaðurin heitt á formannin í Javnaðarflokkinum, Jóannes Eidesgaard at standa á odda fyri samráðingunum um skipan av einum nýggjum landsstýri. Hetta hendi eftir at teir 7 tingmenninir hjá Javnaðarflokkinum, teir 7 hjá Sambandsflokkinum og tann eini hjá Sjálvstýrisflokkinum høvdu peikað á formann Javnaðarfloksins. Teir 7 tingmenninir hjá Fólkaflokkinum vístu á Anfinn Kallsberg, meðan 8 tjóðveldistingfólk og teir báðir tingmenninir hjá Miðflokkinum peikaðu á Høgna Hoydal.

Hvat hvør enn meinar um hesa avgerðina, so eru helst øll samd um, at tað er gott, at samgongusamráðingarnar fara í gongd alt fyri eitt, nú so nógv liggur á láni politiskt og í samfelagnum. Føroyar hava brúk fyri einum vælvirkandi landsstýri skjótast gjørligt.

Nú hevur so formaður Javnaðarfloksins fingið litið upp í hendi at royna seg og sínar samráðingargávur. Nú nógvir samgongumøguleikar eru vil tað sjálvandi ikki vera nøkur løtt og einføld uppgáva at finna ta best hugsandi samgonguna. Hinvegin er rásarúmið væl størri hesaferð, nú í hvussu er ein av teimum smærri flokkunum hevur givið til kennar, at hann ikki uppá forhond hevur læst seg fastan til ein av stóru flokkunum. Hetta er eitt klókt og skilagott trekk av Sjálvstýrisflokkinum. Flokkurin, sum var við at fara heilt úr politikki, fann síni gomlu bein aftur í valstríðnum, har eitt nú formaðurin í flokkinum á skilagóðan hátt vardi vælferðarsamfelagið og ikki gekk uppá kompromi við óverulig skattalyfti frá stóru borgarligu flokkunum. Jú vist – ein góð vend í einum parti av tí politiska spektrinum.

Men 15 tingmenn eru tveir ov lítið til at skipa eina samgongu. Spurningurin er so, hvønn samráðingarleiðarin fyrst skal fara eftir og um hann skal fylgja alfabetinum ella støddini á flokkum. Ein ABC samgonga er ein møguleiki, og vildi verið møguleiki fyri at víðkað hana við D eisini. Aðrir møguleikar eru ACE ella BCE, sum tó er rættiliga ivasom. Tosað hevur verið um eina CEH-samgongu. Neyvan er hon tann mest upplagda, tá hugsað verður um, at hon bert hevur 17 tingfólk aftanfyri seg. Og tá er heldur ikki vist, at kemiin passar so væl saman heldur. Kanska fortíðin spøkir ella hevur sett síni spor?

Stóri spurningurin í løtuni er, hvat Fólkaflokkurin ætlar og vil. Tá hugsað verður um, at Bjarni Djurholm gjørdist sigursharrin á valinum í høvuðsstaðnum og vitandi, at hann stendur rættiliga langt frá Tjóðveldisflokkinum í fullveldismálinum, so kundi man ímyndað sær, at tað fór at vera lættari hjá A at fara saman við B og C. Sum skilst er heldur ikki vist at meira fullveldissinnaði Poul Michelsen kemur á ting tá avtornar. Tað vil aftur vera eitt pluss fyri ABC. Skeivt er at gera nakra niðurstøðu og mugu vit geva Jóannesi Eidesgaard neyðugu tíðina at finna ta bestu loysnina fyri flestu fólk í landinum. Soleiðis sum hann hevur borið seg at í valstríðnum, har hann hevur lagt dent á sínamillum virðing og samstarv, er hann uttan iva besta boð uppá ein komandi løgmann. Góðan arbeiðshug.

**Sosialurin**

# Formaðurin tók Sambandsflokkin við í fallinum



**Atli Hansen**
*sambandsmaður*

Tað hevur í valstríðnum staðið øllum sambandsfólki greitt, at okkara sambandshugsjón hevur verið illa vard. Fyri umleið einum mánaði síðan hildu meira enn 30% av føroysku veljarunum, at tað var rætt at seta kross við Sam-bandsflokkin. Tann seinasta mánaðin minkaði stuðulin til Sambandsflokkin meira enn 7% points ella við øðrum orðum, so misti flokkurin henda mánaðin umleið 25% av stuðlinum. Úti við 2000 atkvøður. Tað er álvarsamt.

Tað hevur verið sagt, at Sambandsflokkurin vanliga hevur góðar meiningakanningar, men vánalig val. Hetta er ein táta, sum leiðandi sambandsfólk ofta hava uggað seg við. Men hetta er ein kávan útyvir, at flokkurin ikki hevur nóg gott fólk í fremstu røð til at verja hugsjónina í valstríðnum. Og hesaferð var tað út av lagi vánaligt. Sjálvmál eftir sjálvmál gjørdu, at man sum limur í flokkinum hevði bestan hug at venda øllum baki og sløkkja fyri tólinum.

Orðaskiftið í sjónvarpinum sunnukvøldið - um man kann kalla tað orðaskifti - avdúkaði uttan náði veikleikarnar hjá flokkinum. Ein formann við einum skattareformi, sum var loyniligur og so annars bert upplestur frá stevnuskránni, ein røð av fittum, men anonymum (mest) konufólkum, sum lósu eitt ella annað upp. Hvar vóru profilarnir í flokkinum, hvar vóru seljarnir av sambandshugsjónini hetta kvøldið? Hvar vóru teir, sum vóru pápar at skattareforminum og kundu greiða frá tí geniala í honum?

Valið var ein katastrofa fyri formannin, og tað kunnu vit øll vera kedd um hennara vegna. Hon misti helvtina av atkvøðunum í sínum egna valdømi - næstan óhoyrt, men tað sum var verri var, at hon tók øll hini valdømini við í fallinum. Tað er eingin grund til at válka sær í hesum ella gera bronglutar tulkingar, tí úrslitið er so eintýðugt og peikar beinleiðis á formannin. Tí átti hon frá morgninum av mikumorgunin at havt tikið ábyrgdina fyri vanlukkuni og tikið seg aftur og latið næstformannin tikið yvir til onnur loysn er funnin á leiðslutrupulleikunum. Nú hoyrist so at hon hevur brúkt dagin til rannsakan og tikið avleiðingarnar, og tað er gott, men nakað seint.

Við framhaldandi at krøkja seg til maktina hevur formaðurin givið møguleika fyri øðrum tulkingum av valúrslitinum. T. d. hevur DR TV allan dag givið dønum ta fatan, at sambandshugsjónin er minkandi í Føroyum, tí flokkurin gekk aftur. Tey fáa einki at vita um eitt skot í fótin, tí formaðurin ikki kundi greiða frá, hvat politikk flokkurin fór at føra.

Um hesum flokki skal vera lív lagað, má man til at velja leiðslu eftir evnum til at leiða, savna og greiða sambandshugsjónina og ikki eftir ættargrein ella øðrum óviðkomandi dygdum. Ikki fyri at tekkjast ávísum persónum.

Hetta arbeiðið eigur at verða farið undir beinan vegin, soleiðis at limirnir longu á landsfundinum í mars mánaði - og kanska fyrr - fáa møguleika fyri at seta eina aðra leiðslu inn. Eina leiðslu við nevndu dygdum og við framtíðini fyri sær.

Flokkurin við tí bestu stevnuskránni hevur eisini uppiborið at fáa ta bestu leiðsluna. Gerið honum hesa tænastuna.

# Nýggi starvsfólkapolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu

**Føroya Pedagogfelag**

Tað er undrunarvert at hoyra og lesa, at ein serstakur ráðgevandi arbeiðsbólkur - settur av Tórshavnar kommunu - leggur uppskot fyri Tórshavnar Kommunu um at herða reglurnar fyri nær starvsfólkini kunnu fara til jarðarferð ella lækna í arbeiðstíðini.

Hetta er fyri tað fyrsta greitt ein samráðingar spurningur - Felagið hevur júst enda samráðingarnar - ikki eitt orð varð grett undir samráðingunum um at hetta var ein trupulleika. - Hetta hevur verið siðvenja og harvið ein rættur hjá limum felagsins, ið arbeiða hjá Tórshavnar kommunu.

Eitt annað er, at slíkir spurningar skulu leggjast fyri álitisfólkini á ymsu stovnunum - so her er eisini greitt brot á álitisfólkaavtaluna.

Felagið hevur ongantíð frá nøkrum stovni hoyrt um at henda aldargamla føroyska siðvenja er ella hevur verið ein trupulleiki.

Felagið tekur fult undir við úttalilsinum hjá formanninum í Starvsmannafelagnum í Dimmu d.d.

# Skeivur framferðarháttur



**Elin Lindenskov**
*býráðslimur*

Soljóðandi bræv er sent fíggjarnevndini í Tórshavnar kommunu 15. januar 2004 viðvíkjandi starvsfólkapolitikkinum hjá Tórshavnar Býráð:

Vísandi til bræv frá álitisfólkunum, í Tórshavnar kommunu, til fíggjarnevndina, dagfest 19.12. 2003, fari eg við hesum at biðja um at fíggjarnevndin tekur mál nr: 200302381 uppaftur til nýggja viðgerð á fyrstkomandi fíggjarnevndarfundi.

Sum limur í serstaka ráðgevandi arbeiðsbólkinum, kann eg als ikki góðtaka framferðarháttin í hesum máli. Eg fór av fundi í serstaka ráðgevandi arbeiðsbólkinum við teirri trúgv, at málið sjálvsagt fyrst skuldi leggjast fyri stjórnina, síðani álitisfólkini har møguligar rættingar skuldu gerast, áðrenn fíggjarnevndin tók støðu og reglurnar settar í gildi.

Framferðarhátturin í hesum máli er púra burturvið, tí mæli eg til at steðga ígildiskomuni av reglunum beinanvegin. Síðani at taka málið uppaftur til nýggja viðgerð og tá brúka røttu mannagongd vísandi til grein 2 í sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Tórshavnar kommunu.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Løgið val

**Umboð Javnaðarfloksins fyri norðoyggjar á tingi Vilhelm Johannesen, heldur, at úrslitið av løgtingsvalinum var sera løgið**

LØGTINGSVAL 2004
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
– Eg eri ikki nøgdur við tað samlaða úrslitið, staðfestir Vilhelm beinanvegin. Og hann heldur, at tað var eitt løgið val, tí at tann samgongan, sum koyrdi landið út í valið, kom styrkt úr tí.

Persónliga hevði Vilhelm eina afturgongd upp á einar 90 atkvøður. Hann sigur, at ein orsøk er, at onkrir av kjarnuveljarunum hjá Javnaðarflokkinum hava valt onkran annan á listanum.

### Sjálvskrivaður

– Eg upplivdi ferð eftir ferð í døgunum upp undir valið, at fólk komu til mín og søgdu, at tað var ikki neyðugt at velja meg, tí eg kom innaftur við vissu. Men um nú øll hugsaðu so, so hevði eg ikki verðið afturvaldur, sigur hann.

Ein onnur orsøk heldur Vilhelm er, at Sambandsflokkurin óivað hevur tikið nakrar av atkvøðunum eisini.

Vilhelm viðgongur, at hann stúrdi fyri úrslitinum í nakrar dagar serliga beint upp undir valið.

– Kanningar bendu á, at tað fór at verða sera tætt millum Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin, so tað er eyðsæð, at nógvir tankar komu fram, sigur Vilhelm. Men tá samanum kom so var tað ikki so galið hjá flokkinum í norðoyggjum. Hann varðveitti sín mann á triðja plássinum, og tað er Vilhelm sum vera man fegin um.

– Serliga tá eg hugsi um, at hetta helst var seinastu ferð, at eg stillaði upp til eitt løgtingsval. Nú eri eg 61 ár, og um fýra ár verði eg 65, so hetta var helst seinastu ferð. Men ein skal aldrin siga aldrin, sigur afturvaldi tingmaðurin hjá Javnaðarflokkinum í norðoyggjum at enda.



*Vilhelm Johannesen er ikki nøgdur við samlaða úrslitið hjá Javnaðarflokkinum, men hann fegnast um, at flokkurin varðveitti sín triðvalda í norðoyggjum*
*Mynd: Bárður Lydersen*

# Vónbrotið egin ábyrgd

**Tað var ein heldur vónbrotin Eyðun Elttør, sum Sosialurin fekk fatur á heima hjá sær sjálvum mikudagin. Vónbrotið var ikki serliga tað, at hann ikki kom innaftur, men tí at valið hjá Sjálvstýrisflokkinum sum heild ikki var nóg gott**

LØGTINGSVAL 2004
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
– Sjálvandi er ein nakað vónbrotin um úrslitið, men tað veit ein av, tá ein er politikari. Tað er veljarin, sum setur krossin, og tá má ein duga at liva við. Eg kann ikki fara at leggja meg í songina fyri tað, sigur ein avkláraður Eyðun Elttør.

Hann dylir tó kortin ikki fyri, at tað besta hevði verið, um tað hevði eydnast flokkinum at fingið tvey umboð inn á ting.



*Eyðun Elttør harmast um, at tað ikki eydnaðist flokkinum at fáa ein mann inn í Norðoyggjum*
*Mynd: Bárður Lydersen*

– Tað hevði verið eitt veldugt framstig, sigur fyrrverandi landsstýrismaðurin, sum sum nú er ikki longur er aktivur í landspolitikki.

Eyðun heldur tað vera lítið sannlíkt, at ein landsstýrismannasessur kemur upp á tal, men hann viðgongur tó, at alt kann henda.

Og um so er, er Eyðun Elttør til dystin fúsur.

–Um Sjálvstýrisflokkurin kom aftur í samgongu, og eg varð biðin um at vera landsstýrismaður, so hevði eg játtað bæði gleðiliga og álvarsliga, sigur Eyðun Elttør.

Hann sigur, at tá val er, má ein vera realistiskur. Møguleikin fyri ikki at vera afturvaldur vil altíð vera tilstaðar, og hann heldur, at ein má minnast til at tað er eins egna ábyrgd.

– Flokkurin hevði eina afturgongd til valið í norðoyggjum, og tað mugu vit taka til eftirtektar og hyggja, hvat tað er, sum vit hava gjørt skeivt, sigur hann.

Og hann er sannførdur um, at um valið í norðoyggjum og í suðurstreymoy hevði hilnast eitt sindur betur, so hevði flokkurin nátt sínum máli at fáa tveir tinglimir.



*Dúgliga varð roknað aftur og fram í KÍ-høllini fyri at staðfesta, hvør var komin inn um tinggáttina og ikki. Spenningurin var í hæddini, og lagið var allarhelst gott á summum og ringt á øðrum*
*Mynd: Bárður Lydersen*

# Sorgblíður Heini

**Við sorgblídni ásannar Heini O. Heinesen, at hann gjørdist ov stuttur til ein tingsess í komandi valskeiðið eftir 19 ár á tingi**

LØGTINGSVAL 2004
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Heini O. Heinesen er sum vera man vónbrotin av, at hann ikki kom innaftur á ting. Men hann tekur av einum landsstýrissessi, um hann stendur honum í boði*

**Klaksvík:**
– Sjálvandi eri eg vónbrotin, at eg ikki longur eri við í tí, sum man hevur verið við til at byggja upp seinastu 19 árini, sigur Heini O. Heinesen, fyrrverandi tingmaður hjá Tjóðveldisflokkinum í norðoyggjum.

Heini sigur tó, at um ein landsstýrissessur stóð honum í boði, so tók hann av. Ella um Karsten Hansen fer aftur í landsstýri, so fer Heini aftur á ting.

– Eg eri ikki farin nakran veg, eg verði altíð tann sami, so um tað stendur mær í boði, so taki eg sjálvandi av, sigur Heini, sum ynskir at takka øllum veljarunum kring landið, sum hava stuðlað flokkinum og honum persónliga.

– Men tað ber sjálvandi ikki til at siga nakað um samgongu og landsstýrismenn enn, so tað er bara at bíða og síggja, hvussu leikur fer.

Heini hevur nøkur hugskot um, hvør orsøkin er, at hann ikki varð afturvaldur.

– Tað hevur ongantíð verið vældámt í Føroyum, at tú setir ting uppá sítt pláss, so tað hevur óivað eisini havt sín prís, sigur Heini og hugsar her um sín formansess í landsstýrismálanevndini.

Hann heldur eisini, at hann hevur góð úrslit at vísa á frá sínum arbeiði, har landið nú hevur ein línu –og útróðrarflota við yvirskoti.

Hann dylir tó ikki fyri vónbrotinum og sigur, at tá hann gjørdi av at stilla uppaftur til hetta valið, var tað tí, at hann metti seg hava ein boðskap. Hann vildi innaftur á ting at verja vunnin rættindi.

– Men nú sigi eg sum Asbjørn Joensen, sáli, einaferð segði við meg. Tú fært ikki løn fyri tað, sum tú hevur gjørt, men heldur tað, sum tú lovar at gera og ongantíð gert, sigur ein sorgblíður Heini O. Heinesen, sum tó leggur dent á, at hann ber ikki agg til nakran.

Hann er fegin um góða úrslitið hjá flokkinum og ynskir øllum teimum, sum vórðu vald til lukku.